**Skip til rannsóknir av makrelstovninum fyri Havstovuna frá 26. juni til 20. juli 2019**

Havstovan søkir eftir nótaskipi at gera vísindaligar rannsóknir av makrelstovninum í summar. Rannsóknirnar verða fíggjaðar við granskingarkvotu. Upp til 1.900 tons av makreli eru sett av at fíggja rannsóknirnar. Kvotan kann fiskast í føroyskum ella altjóða sjógvi, og verður latin sum egin árskvota sambært § 61 í lógini um fyrisiting av sjófeingi í 2017. Tíðarskeiðið og krøvini, ið skipið skal lúka, eru lýst niðanfyri.

**Freistin at søkja er mikudagin 29. mai 2019 við telduposti til hav@hav.fo**

Tað ella tey reiðarí (skip), ið lúka krøvini, verða biðin um at geva boð uppá, hvussu stóran part av kvotuni, tey kunnu gera rannsóknirnar fyri. Tikið verður av nøktandi tilboði.

**Tíðarskeið**:
Rannsóknirnar verða í tíðarskeiðinum 26. juni til 20. juli 2019. Fyrstu dagarnir verða brúktir til fyrireikingar; væntandi verður siglt 1. juli. Kanningin verður gjørd sum partur av eini felags kanning, har Føroyar, Ísland og Noreg luttaka.

**Krøv til skipið í sambandi við kanningina:**

- Skipið skal hava galdandi fiskiloyvi.
- Ekkólodd: Simrad EK(ER) 60 kHz lodd við bæði 38 og 200 kHz splitbeam botnum.
- Skipið skal hava tóvmegi til at tóva flótitrolið (Vónin 832 m) í vatnskorpuni við upp til 5 míla ferð. Reiðskapurin er eitt Vónin 832 m MULTPELT flótitrol við tilhoyrandi útgerð. Lemmar: Injector F-15, 6 $m^2$, 2000 kg.
- Trolveirur: Av tí at tóvað verður í vatnskorpuni, skal skipið hava flótiveir (Dynema ella líknandi, í minsta lagi 500 m). Gjørligt skal eisini verða at tóva djúpari við somu útgerð.
- Skipið skal hava trol sensorar, ið skulu brúkast til at máta ymsar parametrar á trolinum/lemmunum (Scanmar, Simrad og/ella Marport dekkseind og sensorar).
- Skipið skal hava koyggjupláss til fimm fólk frá Havstovuni (minst fýra kømur).
- Kanningarumhvørvið umborð: Tað skal vera gjørligt at standa innandura og taka sýni av veiðuni. Her skal borðpláss (100x60 mm) vera til mátibretti og elektroniska vekt.
- Internetsamband skal vera umborð við eini vælvirkandi LAN-skipan. EK60-ekkólodd teldan og arbeiðsteldurnar skulu hava samband við netið umborð.
- Á brúnni skal vera pláss til tveir granskarar at sita við skriviborð og viðgera tølini.

**Útreiðslur í sambandi við kanningina:**
Skipið skal bera útreiðslurnar, sum Havstovan hevur í sambandi við yvirlitstrolingar í summar. Útreiðslurnar verða mettar at verða umleið 600.000 krónur, og fevna um ymsa útgerð í sambandi við kanningarnar, umframt útreiðslur hjá Havstovuni í sambandi við siglingina og til viðgerð av data og sýni, sum eru tikin umborð. Endaligu útreiðslurnar verða gjørdar upp eftir túrin.

**Umsóknin skal sendast til:**
Havstovan (hav@hav.fo)
Nóatún 1
100 Tórshavn
**Att: Erling í Liða**